

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 10 - 2012

# Mærsk skrúvar kranarnar frá

Danska A.P. Møller-Mærsk hevur so stórar framtíðarætlanir, at fyritøkan ætlar sær at økja oljuframleiðsluna 50 prosent hetta til 2020. Sum er framleiðir felagið 265.000 tunnur um dagin, men fyritøkan ætlar at fáa framleiðsluna upp á 400.000 tunnur í 2020. Mærsk hevur lagt eina fullfíggjaða ætlan fyri, hvussu hon skal røkka málinum. Í fyrsta umfari er talan um fýra verkætlanir, sum hava fingið góðkenning, og sum skulu setast í verk hetta til 2014. Tær skulu geva 58.000 tunnur av olju um dagin. Haraftuat koma verkætlanir, sum felagið væntar at fáa góðkenning til, og sum skulu geva 160.000 tunnur afturat um dagin. -Vit hava havt góð úrslit av okkara leiting, og tey næstu árini fara vit at gera munandi íløgur í at menna leiðirnar, sigur Nis Smedegaard Andersen, aðalstjóri í A.P. Møller-Mærsk, við fjølmiðlarnar. Hann leggur afturat, at fyritøkan hevur ta fíggjarligu orkuna, evnini og royndirnar til at fullføra verkætlanir, sum skulu fáa ta dagligu framleiðsluna upp á 400.000 tunnur. Størri íløgur Sum er ger Mærsk ílgur fyri einar 15 milliardir krónur um árið í oljuvinnuna, men í komandi árum er ætlanin at brúka millum 15 og 25 milliardir krónur um árið til íløgur í hendan partin av virksemi felagsins. Nils Smedegaard Andersen sigur, at felagið fer at leggja nógva orku í at finna nýggjar leiðir fyri at varðveita eina stóra framleiðslu.